# Tað er lættari at yrkja á føroyskum



*- Tað er lættari at skriva yrkingar við innihaldi, tá tú skrivar á tínum egna máli, sigur Rókur Jacobsen, sangari í rockbólkinum Tangz*

**- Føroyskt er mítt móðirmál, og tí yrki eg á føroyskum. Eg eri ikki hugaður at syngja plattar enskar tekstir, sigur Rókur Jacobsen, sangari í rockbólkinum Tangz**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Tangz er ein av fáu føroysku rockbólkunum, sum gjøgnumføra sín tónleik við føroyskum yrkingum.

Sangarin í bólkinum, Rókur Jacobsen, skrivar allar tekstirnar, og hann er avgjørdur í, at hann eigur at skriva á føroyskum.

- Føroyskt er mítt móðirmál, og tí yrki eg á føroyskum. Tað er lættari at skriva yrkingar við innihaldi, tá tú skrivar á tínum egna máli. Eg eri ikki hugaður at gera og syngja plattar enskar tekstir, segði Rókur Jacobsen í útvarpssendingini, Víkin, sum verður send sunnukvøld í ÚF.

- Skuldi eg skriva enskar tekstir, so hevði tað verið ein treyt, at eg hevði dugað betri enskt, sigur hann.

Rókur Jacobsen fæst ikki til at siga, at aðrir føroyskir bólkar eisini áttu at skriva sangir á føroyskum heldur enn enskum.

- Tað skal eg ikki gera av fyri teir, tí tað eru nógvir føroyingar, sum hava stóran áhuga fyri enskum yrkingum og sum duga málið væl. Tí liggur tað helst eisini betri fyri hjá teimum at yrkja á enskum, heldur hann.

# Týr ov harðir til RecArt

*- Okkara tónleikur vísti seg at verða ov harður fyri Jens Ova Friis, men vit hava so fingið munandi betri demosangir, enn vit høvdu framanundan, og tað kunnu vit ivaleyst brúka til okkurt, sigur Heri Joensen, gittarspælari í Týr*



**Einki spurdist burtur úr sambandinum millum føroyska rockbólkin Týr og danska plátufelagið RecArt. Men teir í Týr kunnu hinvegin fegnast um, at teir eiga størsta hittið í føroyskum tónleiki í løtuni**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Í mai mánaði var rockbólkurin Týr í kenda danska PUK Studio í eina viku og gjørdi demoupptøkur til plátufelagið RecArt.

Hetta kom í lag, eftir at stjórin í RecArt, Jens Ove Friis, hevði upplivað Týr í Prix Føroyar finaluni í Norðurlandahúsinum.

Samband var millum RecArt og Týr eftir Prix-finaluna, og tað var nevnt í krókunum, at RecArt møguliga skuldi gera sáttmála við Týr.

Men hetta varð av ongum.

Týr hevur fingið boð frá RecArt um, at tað verður eingin sáttmáli.

- Okkara tónleikur vísti seg at verða ov harður fyri Jens Ova Friis, men vit hava so fingið munandi betri demosangir, enn vit havdu framanundan, og tað kunnu vit ivaleyst brúka til okkurt, sigur Heri Joensen, gittarspælari í Týr.

## Helst meira rockkvæði

Ormurin langi í rockútgávuni hjá Týr er størsta føroyska hittið í løtuni. Sangurin hevur í sjey vikur á rað ligið ovast á 15 teimum bestu, sum er hitlistin hjá Útvarpinum. Hetta er sera sjáldsamt avrik.

- Tað er ótrúligt, at vit enn eru fremstir á 15 teimum bestu. Vit eru rættiliga glaðir fyri tað og takka øllum, ið atkvøða fyri okkum, sigur Heri Joensen

Hvat heldur tú tað er, sum ger Ormin langa so væl dámdan?

- Tað er sjálvandi lættari at taka eitt gamalt lag og broyta tað, heldur enn at gera eitt nýtt lag. Øll kenna Ormin langa frammanundan Vit hava bert sett rokktónleik afturat. Hinir bólkarnir í Prix Føroyum skulu fyrst bíða til fólk kenna løgini væl, áðrenn tey rættiliga sláa ígjøgnum.

Kann tað hugsast, at tit fara at gera eina rockútgávu av onkrum øðrum kvæði?

- Øll okkara løg hava okkurt við kvæðini at gera. Antin stevið ella løgini ella bæði, og tað er sjálvt konseptið ella hugskotið aftanfyri bólkin, og tað fara vit altíð at halda okkum til. Men bert at seta nýggjan tónleik kvæði er ikki nakað, vit ætla gera burturav. Men helst verður tað endurtikið, tí sum tað sæst, so dámar fólki tað sera væl.

Týr verður ein av bólkunum, sum fer at spæla ólavsøkukonsertini 27. juli.

# Lena og Niclas selt ein sang í USA

**Útgávufelagið, Global Grafitti, í Los Angeles hevur keypt ein sang frá Lenu Andersen og Niclasi Johannesen. Amerikanska felagið ætlar at fáa sangin fram í USA**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Lena Andersen og Niclas Johannesen arbeiða framhaldandi fyri at vinna fram í Norðuramerika, har teir eisini búgva. Og tað eru onkur frambrot at fegnast um.

Nú hevur eitt útgávufelag í Los Angeles keypt ein sang frá Lenu og Niclasi, og felagið ætlar at fáa sangin fram í USA.

Felagið kallast Global Graffiti og fæst serliga við at selja tónleik til filmir og sjónvarpsrøðir. Nógv dømi eru um bólkar, sum hava vunnið fram umvegis sjónvarpsraðsendingar og filmir, og tí kann nakað gott fara at spyrjast burtur úr hesi søluni.

Avtalan millum Global Graffiti og Lenu og Niclas er ein sokallað publishingavtala. Hetta merkir, at amerikanska felagið hevur keypt rættindini til sangin og kann nýta hann í tí høpi, felagið hevur hug til.

- Avtalan kom í lag gjøgnum eitt amerikanskt felag, ið kallast TAXI, sum vit eru limir í. Okkara tónleikur var sendur til Global Graffiti, sum síðani setti seg í samband við okkum, sigur Niclas Johannesen.

Sangurin, ið tey hava selt, eitur Beautiful. Tað er eitt lag, sum tey skrivaðu og tóku upp sum demo í Vancouver fyri tveimum árum síðani, og sum fleiri feløg hava víst áhuga fyri.

Sangurin og ein lýsing av Lenu er at finna á heimasíðuni hjá útgávufelagnum. Adressan er www.globalgraffiti.com



# Kall og TeleF leggja saman

**Alt bendir á, at fjarskiftisfyritøkurnar Kall og TeleF fara at leggja saman fyrsta dagin. Helst verður talan um at Kall yvirtekur TeleF. Umboð fyri føroysku eigararnar í Kalli og TeleF fóru í gjár til Íslands at samráðast um samanleggingina**

FJARSKIFTI
*Rúnar Reistrup*




*Eigararnir handan Kall og TeleF eru í løtuni staddir í Íslandi har teir samráðast um møguliga samanlegging av fyritøkunum báðum. Helst verður tað Kall, sum yvirtekur TeleF*

*Mynd: Jens K. Vang*

Umborð á Íslandsflogfarinum í gjár vóru umboð fyri eigararnar á teimum báðum størstu privatu fjarskiftisfyritøkunum í Føroyum, TeleF og Kall. Endamálið við ferðini er at samráðast um eina samanlegging av báðum fyritøkunum.

Orsøkin til at farið varð til Íslands er, at samráðast skal við íslendsku fjarskiftisfyritøkuna Íslandssími, ið eigur helvtina av partapeninginum í TeleF. Hina helvtina eigur TeleTænastan hjá Billy Hansen. Billy Hansen, sum eisini er stjóri á TeleF, var ein av teimum, sum fór til Íslands í gjár.

Í Kalli er Framtaksgrunnur Føroya størsti einstaki partaeigari við 38,41 prosentum av partapeninginum. Hinir høvuðspartaeigararnir eru Kaupthing og svenska fyritøkan Tallaton Holding. Umboð fyri hesar fóru eisini til Íslands í gjár.

## Ikki pláss fyri trimum

Tá lógin um fjarskifti lat upp fyri fríari kapping á fjarskiftismarknaðinum, vórðu tvær fyritøkur stovnaðar, ið báðar ætlaðu sær at taka dystin um viðskiftafólkini upp við Føroya Tele. Fyritøkurnar, TeleF og Kall (sum tá brúkti navnið Alnót blaðm.), høvdu báðar ætlanir um at koma inn á marknaðin fyri fastnettelefoni, internet og fartelefoni innan eitt ár.

TeleF kom fyrst frá byrjan og fór at bjóða fastnettelefontænastur út fyrst í hesum árinum. Nú fyritøkan hevur verið á marknaðinum í gott hálvt ár hevur tað eydnast at fingið smáar túsund telefonfelagar.

Kall kom nakað seinni á marknaðin og byrjaði at bjóða tænastur út innan fastnettelefoni og internet.

Tað hevur leingi ligið í luftini, at ikki er pláss fyri tveimum televeitarum afturat Føroya Tele, og tí kemur samanleggingin ikki heilt óvæntað.

At tað helst verður Kall, sum yvirtekur TeleF og ikki øvugt, hevur eisini verið væntandi, tí Kall er tann peningasterkara fyritøkan av teimum báðum.

## Innleiðandi fundur

Nevndarformaðurin í Kalli, Jens Kári Vilhelm, váttar fyri Sosialinum, at eigararnir handan Kall og TeleF fara at hittast í Íslandi at tosa um eina møguliga samanlegging.

– Vit fara yvir at hoyra hvat eigararnir av TeleF siga, og fyri at vita um har er áhugi fyri at leggja saman. Vit fara at samráðast um eina felags framtíð fyri feløgini bæði, sigur Jens Kári Vilhelm.

Sambært nevndarformanninum í Kalli er talan um innleiðandi samráðingar, og tí er ikki vist at nøkur føst avtala kemur burturúr fundinum millum eigararnar.

Spurdur um hvør yvirtekur hvønn, vísir Jens Kári Vilhelm bert til, at tað ikki er nøkur loyna, at Kall er nakað framman fyri TeleF í kappingini teirra millum.

## Lítlan marknaðarpart

Bæði Kall og TeleF hava í løtuni so lítlan marknaðarpart, at samanleggingin fer ikki at hava so stórvegis týdning fyri styrkimunin millum Føroya Tele og ta eftirverandi privatu fyritøkuna í fyrstu atløgu.

Men ein samanlegging fer at merkja, at privata fyritøkan kann brúka alla sína orku til kappingina við Føroya Tele. Eisini merkir ein samanlegging, at tað verður lættari hjá privatu fyritøkuni at profilera seg á marknaðinum.

– Vit síggja tað um ein stóran fyrimun at tað bara er ein nýggj fyritøka á marknaðinum, sigur Jens Kári Vilhelm.

Billy Hansen, stjóri og nevndarlimur í TeleF, ynskti ikki at gera nakrar viðmerkingar um málið undan fundinum við eigararnar av Kalli.

# Politiskir undirtónar í Sandagerði

**Yvirtónarnir og millumtónarnir vera tónleikur frá Tangz, Clickhaze og øðrum frægum tónleikabólkum, meðan undirtónarnir fara at ljóma av politikki, tá konsertin »Free Føroyar« sendir ljóðbylgjur út ígjøgnum hátalararnar leygarkvøldið í Sandagerði.**

KONSERT
*Rúnar Reistrup*

Boðskapurin er politiskur tá konsertin »Free Føroyar« verður hildin á Sandagerði leygarkvøldið. Men hóast føroyska umsetingin av konsertheitinum er »Fríu Føroyar«, so er ikki talan um nakra kommunistiska konsert til frama fyri kollveltingina á Kuba, men hinvegin eitt tiltak til frama fyri ta politisku kósina, sum hevur hugtakið »fullveldi« sum hægsta mál.

Tað er Unga Tjóðveldi hevur tikið stig til »Free Føroyar«. Eitt líknandi tiltak var á høllini á Læraraskúlanum fyrr í ár, og hetta eydnaðist so væl, at tey í Unga Tjóðveldinum hava kastað seg út í konsertfyriskipan aftur.

Tiltakið byrjar klokkan 18.00 leygarkvøldið og heldur á út í ta ljósu náttina. Fyrst verður konsert, síðan verður bál tendrað um midnáttarleitið, og Dávur Isfeldt fer at halda røðu. Eftir hetta verður felagssangur og føroyskur dansur.

Tiltakið er fyri øll, siga fyrireikararnir, og tí er ikki neyðugt at hava hvørki limakort ella politiskan lit fyri at sleppa á Sandagerð at hugna sær leygarkvøldið.



*Frá fyrstu Free Føroyar konsertini*